# Føðiúrvalið hjá súlu er rættiliga fjølbroytt

**Ein kanning, sum nemingur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya hevur gjørt, vísir, at súla etir høgguslokk og nógv ymisk fiskasløg**

KANNING
*Vilmund Jacobsen*

Í endauppgávu síni á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, kannaði vestmenningurin, Fróði B. Skúvadal, føðina hjá súlu. Hetta er ein sonevnd magakanning av súluungum í Mykineshólmi.

Súlumagarnir, sum kannaðir eru, stava frá árunum 1993, 1999 og 2001, og teir eru samlaðir í samband við árligu súluveiðina í Mykinesi, sum júst hevur verið.

Hetta er eisini ein liður í eini kanning hjá Fiskirannsóknarstovuni um vistskipanina kring Føroyar.



*– Seiður er høvuðsføðin hjá súlu, men fuglurin etur nógv onnur fiskasløg, eisini høgguslokk, sigur Fróði B. Skúvadal, sum í samband við uppgávu á Náttúruvísindadeildini hevur kannað súlumagar.*

### Nitrur og høgguslokkanev

Kanningin hjá Fróði fevndi um tilsamans 90 súlumagar. Úr magunum tók hann nitrur og høgguslokkanev; tað er nevið, sum situr á høvdinum á høgguslokki, har armarnir byrja.

Til tess at finna út av, hvørji fiskasløg, súlan etur, vórðu nitrurnar býttar upp eftir fiskasløgum, eins og høgguslokkanevini vórðu tald.

– Úrslitið av kanningini vísir, at ein týdningarmikil partur av føðini hjá súlu er seiður, høgguslokkur og nebbasild, sigur Fróði í samandrátti sínum.

Hann vísir á, at høgguslokkanev vórðu funnin í 44,4% av magunum frá 1993, í 51,2% í 1999, og í 2001 vórðu høgguslokkanev funnin í 45% av magunum.

– Taka vit seiðin, vórðu seiðanitrur funnar í 33,3% av súlumagunum frá 1993, í 43,9% av magunum frá 1999 og í 15% av magunum frá 2001.

Í magunum frá 1993 vórðu ongar nebbasildanitrur funnar, men í 1999 vóru tær at finna í 51,2% og í 32,5% í 2001.

### Bara seiður í 1993

Fróði sigur, at í 1993 vórðu bara nitrur úr einum fiskaslagi funnar, og tær vóru sum nevnt úr seiði.

– Sostatt át súlan bara seið í 1993 og ikki onnur fiskasløg, undantikið høgguslokk, sum var funnin í 44,4% av magunum fyri hetta árið, sigur hann.

Í 1999 vóru nitrur at finna av 7 ymiskum fiskasløgum, og í 2001 vóru fiskasløgini í súlumag-unum 10 í tali.

– Kanningin sigur okkum, at súlan hevur stórt úrval av føðimøguleikum, sigur Fróði B. Skúvadal í samandráttinum um kanningina av súlumagum.

Vegleiðari hjá Fróða var Bergur Olsen, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni. Eyðfinn Magnussen á Fróðskaparsetri Føroya var ábyrgdarvegleiðari.

# Minni PCB í umhvørvinum

**Hetta vísir ein áhugaverd kanning, sum gjørd eru av PCB-innihaldi í teistaeggum**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*

Kristiín Sv. Ólafsdóttir, sum hevur gingið á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, hevur í samband við høvuðsuppgávu sína kannað PCB í teistaeggum. Vegleiðari hjá henni var Maria Dam, sum starvast á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.



*Kanningin, sum Kristín Sv. Ólafsdóttir hevur gjørt í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, vísir, at PCB'ið í umhvørvinum minkar*

### Teistaegg á kanningarstovu í Kanada

Í sínum samandrátti, vísir Kristiín í fyrsta lagi til eina kanning hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni:

– Henda kanning vísti eina »signifikanta« minking av PCB innihaldi í teistaeggum árini 1999 til 2001.

Hon sigur, at til tess at finna út av, um minkingin stendst av minni »konsentratión« av PCB í umhvørvinum, ella um hetta er orsaka av broyttum føðiúrvali hjá teista, vórðu tvær ymiskar kanningar gjørdar.

– Isotopukappingar av teistaeggum vórðu gjørdar á kanningarstovu í Kanada, og síðan var magainnihaldið hjá 30 teistum eisini kannað her heima.

Kristín sigur, at kanningin av magainnihaldinum er samanborin við eina aðra kanning, sum varð gjørd í 1998.

### Minking av PCB í umhvørvinum

– Isotopukanningarnar í Kanada vístu, at teistin í størri mun er farin at eta føði, sum er hægri uppi í føðiketuni, enn hann gjørdi áður.

Hon vísir á, at PCB er evnir sum »konsentrerast« upp ígjøgnum føðiketuna; tí kann minkingin av PCB í teistaeggum, sum kanningarnar vístu, ikki skyldast broytta føðiúrvalið hjá teistanum.

– Hetta merkir við øðrum orðum, at ein minking av PCB er farin fram í umhvørvinum, sigur Kristín Sv. Ólafsdóttir í samandrátti sínum.

Ábyrgdarvegleiðari hjá Kristín á Náttúruvísindadeildini var Trygvi Vestergaard, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya.

### Líkist DDT

Í stuttari viðmerking, sigur Maria Dam á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, at PCB er ein olja, sum er ógvuliga støðug, tá ið hon endar í umhvørvinum. Evnið finst eitt nú í bygningstilfari og el-instalatiónum.

– Í náttúruni líkist PCB DDT, sigur hon.



# Fólk og kópar í Sandoynni

**Sølktuvík er sera náttúruvakurt stað, og tí hava eiisni kópparnir funnið útav. Teir eru nógvir í tali og hugna sær væl inni á víkini**

STARVSVENJING
*Brynhild H. Reinert, praktikantur*

Fríggjadagin vóru vit, eg, hin praktikanturin og blaðmaðurin, ein túr á Sandoynni.

Fyrst fóru vit til Skopurnar. Har tosaðu vit við borgarstjóran, Gerhard Lognberg.

Síðan koyrdu vit gjøgnum bygdirnar Húsavík, Skálavík og Sand. Ikki nógv fólk var at síggja henda seinnapartin, so vit fóru til Dals.

Vegurin til Dals er smalur, og tað er høgt oman. Omanlop er ofta á hesum vegnum, og vit fingu at vita, at omanlop hevði verið sunnudagin. So tað var eitt sindur óhugnaligt at koyra, men vit komu til Dals í øllum góðum. Í Dali, sum er ein lítil bygd, var heldur ikki nógv fólk at síggja henda dagin, hóast veðrið var sera gott.



*Praktikantarnir á Sosialinum hugnaðu sær óført saman við kópunum í Søltuvík hendan dagin. Kóparnir vóru forvitnir og komu heilt nær at heilsa upp á tær báðar á steininum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Nú vóru eini tveir tímar til Teistin sigldi av Gomlurætt, og vit høvdu verið í øllum bygdunum á Sandoynni. So vit fóru ein túr til Søltuvíkar. Í Søltuvík er sera vakurt. Har er so friðarligt, og veðrið var eisini av tí allar besta. Vit gingu ein túr í víkini, og tá sóu vit nakrar kópar spæla á sjónum. Har vóru eini 10-20 kópar. Teir vóru sera forvitnir, tí tá teir sóu okkum, svumu teir eitt petti inn móti landi. Men teir komu ongantíð heilt inn at landi. Vit gingu longur yvir, og tá sóu vit okkurt stórt úti á sjónum. Fyrst hildu vit, at tað var ein stórur steinur. Men nærri vit komu, sóu vit, at "steinurin" rørdi seg. Og nú sóu vit, at hetta var ikki ein steinur, men ein kópur. Kópurin var bæði stórur og feitur. Eg haldi eisini, at hann var eitt sindur gamal, tí hann flutti seg ikki, tá hann sá okkum. Ella var hann bara dovin.

Tá vit høvdu verið í Søltuvík eina løtu, máttu vit skunda okkum á Gomlurætt, Teistin sigldi klokkan 14.

Hetta var ein stuttligur dagur á Sandoynni. Veðrið var gott, og so hevði eg ongantíð verið á Sandoynni fyrr.

Kvinnuhúsið:

# Fundur um prostitutión

**Politikararnir eiga at gera greitt, hvør føroyski hugburðurin er til prostitu tión og striptease, metir Kvinnuhúsið, ið skipar fyri fundið evnið**

FUNDUR
*Heri á Rógvi*

Kvinnuhúsið stílar fyri almennum fundi um prostitutión – skøkjulevnað - í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 11. september kl. 19.30.

Og tað er ikki uttan orsøk, at Kvinnuhúsið hevur tikið stig til fundin.

— Seinastu árini hava strepatease dansarar verið í Føroyum og framført. Sama hendi fyri fáum árum síðan í Íslandi, hettar hevur útviklað seg til, at har eru 7 bordellir. Nógvir pengar eru í pornoídnaðinum.Tað bíligasta fyri fyriskipaðarnar er at fáa, ofta undir skeivum fortreytum, útlendskar kvinnur. Kvinnurnar eru flestar úr Ásia og Eystursevropa, hava visum í avmarkaða tíð, og hava tí ikki nøkur rættindi og eru prísgivnar fyriskiparinum. Royndirnar úr Noregi, eftir at olja var útvunnin har, og nógv fremmand arbeiðsmegi kom til landið, eru at krøvini um kynsligar veitingar eru øktar munandi, skrivar Kvinnuhúsið í tíðindaskrivi.

Kvinnuhúsið metir, at tað frá politiskari síður eigur at verða gjørt greitt, hvør hugburðurin er.

— Er tað góðtikið, at vit hava alment streaptease show í Føroyum? Hvar kunna vit vænta tað næsta verður? Lat okkum verða medvitandi um trupulleikan, áðrenn vit standa mitt í honum, ljóðar tað frá Kvinnuhúsinum.

Fyrilestrarhaldari á fundinum verður Dorit Otzen, sum er víðagitin sosialráðgevi í Danmørk. Hon hevur fingist nógv við viðgerð til fólk, ið eru komin illa fyri orsakað av skøkjulevnaði og rúsevnum.

# Stórur skari á brúkarafund

**35 fólk komu uttan úr heimi á stóran brúkarafund, ið byrjar hósdagin**

BRÚKARAFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Norðurlendska Brúkaranevndin fer í døgunum 12. og 13. september at halda ársfund og ráðstevnu í Føroyum.

Norðurlendska Brúkaranevndin er samstarvsnevndin hjá brúkararáðunum í Norðanlondum. Her luttaka umboð fyri Brúkararáðini í Íslandi, Grønlandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Finlandi. Av góðum grundum eru Føroyar ikki við í hesum samstarvi, tí enn hava vit onki brúkararáð og onga skipan fyri brúkararnar her. Men tað kann kanska broytast, og m.a. tí hevur Norðurlendska Brúkaranevndin (NBN) avgjørt at halda sín ársfund júst í Føroyum.

Umframt at NBN heldur sín regluliga ársfund fund her, vil hon eisini nýta høvi at greiða føroyingum frá, hvussu arbeitt verður fyri brúkaraáhugamálum í Norðanlondum og frá aktuellum brúkarapolitiskum høvuðsmálum.

Enska heitið á seminarinum er "Digi-tv - television as a consumer platform". Hetta snýr seg m.a. um, at við digitalu ella teldutøkniligu menningini av sjónvarpinum, hendir ein grundleggjandi og álvarslig broyting í samskiftinum millum hyggjararnar (ella brúkararnar) og sjónvarpsstøðirnar. Umframt vøksturin í útboði av ymsum rásum, koma sonevndar interaktivar tænastur (har hyggjarar kunnu samskifta beinleiðis við ein útbjóðara), spøl og ítriv, og elektroniskur handil sum beinleiðis søla og keyp av vørum og tænastum.



*Áhugin er stórur fyri Brúkararáðstevnuni, ið verður hildin seinni í vikuni á Hotel Føroyum.*

### Leggja nógv fyri

Ikki kann sigast annað enn at áhugin fyri ráðstevnuni er stórur.

Formennininir og aðrir leiðarar fyri Brúkararáðinií teim ymisku norðurlondunum eru seytjan í tali. Afturat hesum koma koma eini 18 serfrøðingar/granskarar/fakfólk at luttaka á

sjálvari ráðstevnuni um "Digi-tv - television as a consumer platform". So er innbjóðingar sendar til einar 40 føroyskar luttakarar.

Tað er Hans Pauli Strøm, ið er føroyskur kontaktpersónur. Hann fegnast um stóra áhugan uttan úr heimi, og hann vónar at síggja nógvar føroyingar til ráðstevnuna, tí hann metir, at vit í Føroyum mest sum standa á berum innan brúkaravernd.